## Marknaðardagur í Gongugøtuni í Havn

Sunnudagin 24. mai frá kl. 13.00 – 17.00 skipar Margarinfabrikkin fyri marknaðardegi í Gongugøtuni í Havn. Endamálið við hesum degi er at skapa lív og hugna í miðbýin. Borð verða uppsett omaneftir Gongugøtuni, har fólk hava møguleika at selja t.d. gomul ting, brúktar bøkur, gomul klæðir, heimagjørdir prýðislutir o.a. Ætlanin er ikki at hava hoppiborg, karrusell, elastikkspring og líknandi. Leigan fyri hvørt borð er 250 kr.. Hesar 250 krónurnar fara í eina pulju, sum skal nýtast til spennandi upplivingar fyri børn og ung í Margarinfabrikkini. Peningurin, selt verður fyri, fær seljarin sjálvur. Í hesum tíðarskeiði verður Gongugøtan stongd fyri ferðslu. Um tú hevur okkurt at selja, skalt tú senda ein mail til: fabrikkin@torshavn.fo Í mailinum skalt tú upplýsa, hvat tú ætlar tær at selja, og hvussu nógv borð tú hevur brúk fyri. Freistin at senda inn mail er mikudagin 20. mai. -



# Captain Gorbatjov – Olshana umaftur?

**Enn ein umhvørvisvanlukka hóttir føroyskar firðir og strendur, nú russiski trolarin, Captain Gorbatjov, sum liggur í Nólsoyarfirði, er farin at leka olju út á sjógv**

DÁLKING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Nú olja aftur lekur úr einum skipi í Nólsoyarfirði, er spurningurin, hvussu nógv vit hava lært – og hvat í veruleikanum skal til, áðrenn vit sum samfelag taka okkum um reiggj og gera nakað veruligt við tilbúgving í Føroyum*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Russiski trolarin, Captain Gorbatjov, sum í gjár bunkraði 450.000 litrar av tungolju, fór í gjárkvøldið at leka olju út á sjógv.

Tað vóru fólk á Argjum, sum løgdu til merkis, at olja bráaði aftur úr skipinum og fór suður ígjøgnum fjørðin við streyminum.

Tjaldrið og bjargingarbáturin Lív fóru longu í gjárkvøldið út í fjørðin og løgdu sperringar um skipið.

Løgreglan hevur eisini verið umborð, samstundis sum skiparin á russiska skipinum er skuldsettur í málinum.

Sambært løgregluni í morgun, vil skiparin á Captain Gorbatjov ikki viðganga, at tað er skipið hjá honum, sum er atvoldin til, at oljan er likin á sjógv.

Eingin ivi er tó um hetta, tí myndir, sum longu vórðu tiknar í gjárkvøldið, vístu týðuliga, at tað er haðani, oljan stavar.

### Sliskan slitin

Sum skilst, eru teir 450.000 litrarnir av tungolju í fýra tangum umborð á russiska trolaranum, og mangt bendir á, at tað er tann eini tangin, sum er farin at leka.

Hetta er eftir øllum at døma tangin, sum liggur undir sliskuni hjá trolaranum. Sliskan slítist, sum tíðin gongur, tá trolreiðskapur verður drigin aftur og fram.

Tað verður ivaleyst vónleyst at fáa bilbukt við oljuni, sum er farin suður gjøgnum Nólsoyarfjørð og er rikin vesturyvir í Skopunarfjørð.

Í løtuni sigur hann landnyrðing, men seinni boðar hann frá eystri og landsynningi, sum við sjóvarfallinum kann føra oljuna, sum longu er likin úr skipinum, at landi aftur.

### Lítið frættist

Í morgun hevur fundarvirksemi verið um oljuna, har ymiskir partar innan tilbúgving hava verið við.

Lítið og einki er frætt frá fundinum, sum byrjaði stundisliga í morgun, og vit skiltu fyri deadline hjá blaðnum, at einki serligt fór at verða sagt, fyrr enn á tíðindafundi á Umhvørvisstovuni á Argjum klokkan 11.

Tað er Umhvørvisstovan, sum hevur sett seg við borðendan og hevur átaksleiðsluna um hendi.

Vit tosaðu eftir fundin við Rógva Johansen, tilbúgvingarsamskipara hjá MRCC Tórshavn, men hann vísti til Umhvørvisstovuna. Vit settu okkum síðan í samband við Súna Petersen hjá Umhvørvisstovuni, ið vísti til tíðindafundin, sum stundaði til.

Hvørgin teirra vildi siga nakað ítøkiligt um støðuna fyrr enn á tíðindafundinum.

### Olshana umaftur?

Øll minnast tosið um tilbúgving, tá russiski trolarin Olshana sigldi á Flesjarnar og fórst við stórari nøgd av olju. Mong hildu tá, at oljan kundi verið tikin úr skipinum, áðrenn skipið fór til botns, men hetta varð ikki gjørt, og tí liggja nú nøkur hundrað tons av olju á havsins botni við munnan á Kalsbaksfirði og Sundalagnum, har nógv aling fer fram.

Nú aftur ein oljudálking hóttir okkara umhvørvi, er spurningurin, hvussu nógv vit lærdu av Olshanumálinum.

Anny á Hædd, sum var tilbúgvingarstjóri, tá Olshana fórst, var fyri stórum atfinningum, men síðan hon fór úr starvi, er eingin settur í hennara starv.

Starvið hjá Rógva Johansen, sum hevur heitið tilbúgvingarsamskipari, er ikki starvið, sum Anny á Hædd hevði. Hansara leiklutir er heldur ikki hin sami, sum leikluturin var hjá tilbúgvingarstjóranum.

Nú olja aftur lekur úr einum skipi í Nólsoyarfirði, er spurningurin, hvussu nógv vit hava lært – og hvat í veruleikanum skal til, áðrenn vit sum samfelag taka okkum um reiggj og gera nakað við slíka tilbúgving í Føroyum.

# Captain Gorbatjov lekur ikki meiri olju

**- Vit kunnu ikki útiloka eini náttúruvanlukku í løtuni, men higartil eru vit so heppin, at oljan eftir øllum at døma bert er rikin á land við Glyvursnes, sigur Jóhanna Olsen á Umhvørvisstovuni**

DÁLKING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á tíðindafundi í morgun greiddu Jóhanna Olsen, deildarleiðari á Umhvørvisstovuni og Anny á Hædd, deildarstjóri í Innlendismálaráðnum, frá, at eingin olja longur lekur úr russiska trolaranum, Captain Gorbatjov, sum liggur í Nólsoyarfirði.

Ein átaksleiðsla er skipað í sambandi við oljudálkingina, har Innlendismálaráðið, Tórshavnar kommuna, Fiskiveiðieftirlitið, Heilsufrøðiliga Starvsstovan og løgreglan eru við.

Tyrla hevur verið á flogi í morgun og hevur roynt at skrásett, hvar oljan er, sum likin er úr skipinum. Oljan er framvegis í Nólsoyarfirði og nakað er at síggja í Hestfirði. Sum skilst, er oljan higartil bert rikin á land at leiðini við Glyvursnes.

Tað seinasta nýggja er, at Brimil nú eisini er komin til hjálpar og fyrireikar seg at fara út í fjørðin við útgerð. Bjargingarbáturin Lív er í fjørðinum og roynir at fylgja við, hvagar oljan rekur, og sløkkiliðsfólk eru eisini í fjørðinum og hyggja at umstøðunum.

- Vit kunnu ikki útiloka eini náttúruvanlukku í løtuni, men higartil eru vit so heppin, at olja eftir øllum at døma bert er rikin á land við Glyvursnes.

Jóhanna Olsen segði á tíðindafundinum, at fuglur, sum setir seg í oljuna, neyvan ber boð í bý, men annars er ógjørligt í løtuni at siga, hvørjar avleiðingar oljulekin kann koma at fáa, um illa vil til.

- Vit vita ikki í løtuni, hvussu nógv olja talan er um, tí hetta er ikki endaliga staðfest enn.

Á tíðindafundinum varð upplýst, at átaksleiðslan hevur verið í sambandi við Noregi, har tey hava royndir við slíkari olju, ið ikki er hin tjúksta av sínum slag.

- Vit hava samskipað ta útgerð, vit hava í landinum til avbyrging og upptøku, men vit hava eisini møguleikar at fáa útgerð úr Noregi, um hetta skuldi verið neyðugt.

Jóhanna Olsen upplýsti eisini, at átaksleiðslan hevur fólk, sum eru serkøn í streym-og veðurvánum, og at hetta kann vera tryggjandi í átakinum at byrgja upp fyri eini møguligari vanlukku, um ringast vildi til.

- Vit arbeiða í løtuni við at gera eitt yvirlit yvir, hvussu nógv olja er farin á sjógv, og hvussu hon breiðir seg, og ætlandi kann arbeiði at taka olju upp úr sjónum byrja skjótt. Vit hava eisini gjørt okkum eitt yvirlit yvir, hvørji økir eru sárbar, um oljan í størri mun skuldi rikið móti landi.

Jóhanna Olsen helt á tíðindafundinum, at góða veðrið er ein fyrimunur, nú farið verður undir at taka oljuna uppaftur.